VB-Stjørnan 28-23 (15-10):

# Stjørnan fall í Vági

**VB vann týdningarleysa heimadystin á Stjørnuni, men sálarligi týdningurin av sigrinum kann neyvan undirmetast**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast dysturin í Vági byrjaði hálvan tíma áðrenn tann í Havn, so mundu hvørki VB ella Stjørnan ivast í, at Neistin skuldi fara við sigrinum í høvuðsstaðnum.

Tað gjørdi í veruleikanum, at dysturin í Vági var týdningarleysur, tí líkamikið, hvussu úrslitið skuldi laga seg, so skulu liðini hittast aftur, tá hálvfinalurnar koma á skránna.

### Ikki treytaleyst

Í hesum ljósinum hevði Stjørnan valt at spara nakað upp á fólkið. Fyrst og fremst, so ráddi um ikki at fáa nakrar óneyðugar skaðar ella keðilig leikbann, og so kom sjálvur dysturin í aðru røð at kalla. Ikki soleiðis, at Stjørnan ikki ynskti at vinna dystin, men hetta skuldi altso ikki gerast fyri ein og hvønn prís.

Fyrstu løtuna gekk annars javnt á, men um miðjan fyrra hálvleik kom verulig gongd á VB. Seks ferðir á rað sat bólturin í Stjørnu-málinum, og tað var ein munur, sum Stjørnan ongan tíð vann aftur. VB hevur annars fleiri ferðir sýnt troyttleikatekin móti endanum av hvørjum hálvleiki, men hesa ferð vóru tey tó ikki so sjónlig, sum tey onkra tíð hava verið.

### Hálvfinalurnar

Spurningurin er so, hvussu leikur fer, tá liðini aftur hittast í hálvfinalunum. Í øllum førum man sálarliga lyfti hjá VB hava verið ikki heilt einki. Eitt lyft, sum eisini var harðliga tiltrongt, nú úrslitini als ikki hava verið eftir vild seinastu dystirnar.

Tað kann geva teimum trúna uppá, at finalan kann røkkast, hóast Stjørnan á pappírinum framvegis má sigast at eiga sterkasta liðið í landinum.

Samstundis er tað eisini spurningurin,hvørt stríðsviljin hjá Stjørnuni er nóg stórur, nú avgerandi dystirnir standa fyri framman. Av seinatu fýra dystunum eru tríggir taptir. Og tó at boðini eru, at spælarar og venjari nú taka tað róligt, so kann hetta skjótt gerast ein følsk sannføring um, at eingin vandi er á ferð. Ásanna spælararnir ikki tann vandan, kann skjótt henda seg, at hálvfinalurnar verða endastøðin hjá Stjørnuni, og tað var so ikki tað, sum ætlanin var ndan kappingarárinum.



*VB vann ein tryggan sigur á Stjørnuni, sum nú hevur tapt tríggjar av fýra teimum seinastu dystunum*
*Mynd: Áki*

## FAKTA UM DYSTIN

**VB-Stjørnan 28-23 (15-10)**
**Málskjúttar**
**VB:** Daiva Toumaite 7, Gurið Mortensen 7, Mariza Zilko 5(1), Svava Vestergaard 3, Monika Samuelsen 2, Margreth Augustinussen 2, Sára Samuelsen 1, Jóna Thorsteinsson 1
**Stjørnan:** Alina Olaru 9(2), Durita Christophersen 5, Anna Kristina Samson 3, Una Olsen 2(1), Edith Hansen 2, Joan Midjord Djordjevic 1, Katarina Stepanoc 1
**Brotskøst:** VB 3, Stjørnan 7
**Útvísingar:** VB 2, Stjørnan 4
**Dómarar:** Kristian Johasnsen & Sámal Paulason

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

FM-bólkurin

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 6 | 5 - 0 - 1 | 150 | 118 | 32 | 10 |
| 2 Stjørnan | 6 | 3 - 0 - 3 | 147 | 134 | 13 | 6 |
| 3 VB | 6 | 3 - 0 - 3 | 133 | 146 | -13 | 6 |
| 4 Kyndil | 6 | 1 - 0 - 5 | 116 | 148 | -32 | 2 |

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

Sunset-kappingin - Niðari bólkurin

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 6 | 5 - 0 - 1 | 147 | 118 | 29 | 10 |
| 2 Søljan | 6 | 4 - 0 - 2 | 133 | 122 | 11 | 8 |
| 3 Tjaldur | 6 | 2 - 0 - 4 | 135 | 151 | -16 | 4 |
| 4 VÍF | 6 | 1 - 0 - 5 | 123 | 147 | -24 | 2 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 8 | 5 - 1 - 2 | 484 | 422 | 62 | 19 |
| 2 VÍF | 8 | 6 - 1 - 1 | 496 | 464 | 32 | 19 |
| 3 H71 | 8 | 4 - 0 - 4 | 473 | 420 | 53 | 16 |
| 4 StÍF | 8 | 5 - 0 - 3 | 452 | 448 | 4 | 16 |
| 5 KÍF | 8 | 3 - 0 - 5 | 441 | 476 | -35 | 8 |
| 6 Neistin | 8 | 0 - 0 - 8 | 455 | 571 | -116 | 1 |

Neistin-Kyndil 29-17 (14-8):

# Stórsigur í grannauppgerðini

**Neistin vissaði sær oddasessin í endaspælinum, tá tær vunnu tryggan sigur á grannunum úr Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Neistin hevur at kalla verið flúgvandi síðani á nýggjárinum. Fyrsta dystin, sum var á heimavølli móti Stjørnuni, taptu tær, men síðani hevur talan bara verið um sigrar. Millum annað tvær ferðir móti ávíkavist Stjørnuni og VB.



*Tá tær bláu fingu verju- og málmansspæl at rigga, fekk Kyndil ikki gjørt stórt meira*
*Mynd: Álvur*

### Manuela sum lykil

Sunnudagin spældu tær so fyri at halda fast um oddasessin í endaspælinum, og eisini tann uppgávan varð loyst til fulnar.

Fyrstu góðu løtuna var tó einki, sum bendi á nakran stórsigur. Tvørturímóti, so hevði Kyndil sera góðan hug at halda væl fast í oddaliðnum, sum hevði trupult við at fáa samanhang í spælið.

Ein lítil løta kring miðan fyrra hálvleik tóktist tó at avgera tað heila. Frá at vera aftan fyri 4-6, leyp Neistin innan góðar tveir minuttir upp á 8-6 við fýra skjótálopum á rað, og so fekk Kyndil ongan tíð samband aftur.

Sum ikki einaferð, so var tað Manuela Stan Jensen, sum var upphavið til mongu mótálopini hjá Neistanum. Við neyvu útkøstum sínum megnaði hon ferð eftir ferð at finna leysar viðspælarar, og tá Kristina Griksaite royndi at koma langt út fyri at forða hesum, kastaðu Manu bara beina leið í kassan.

Soleiðis var mesti ivin beindur burtur longu undan steðginum. Seinna hálvleik var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin skuldi verða. Ein støða, sum ikki gjørdist frægari hjá Kyndli, tá Jórun Ludvík noyddist av vøllinum, eftir at hon og Nicoleta rendu saman.

### Finaluklárar

Umframt at staðfesta oddasessin í endaspælinum, fekk Neistin eisini trygd fyri, at tær báðar hálvfinalurnar eisini verða móti Kyndli.

Tað líkist eini støðu, har tær bláu kunnu vera púrasta vísar í einum finaluplássi. Tí hóast Kyndil til tíðir hevur argað Neistan í ár, so eru tað við at vera nøkur ár síðani, at tær seinast hava vunnið í landskappingardysti. Og við formkurvuni hjá Neistanum í huga, tykist hendan støðan ikki at broytast soleiðis uttan víðari.

## FAKTA UM DYSTIN

**Neistin-Kyndil 29-17 (14-8)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Nicoleta Radu Hansen 12(2), Ása á Neystabø 5, Mildrið Jacobsen 4, Katrin á Neystabø 2, Kára á Dunga 2, Gunnvá Brockie 1, Rakul Augustinussen 1(1)
**Kyndil:** Lina Adriulyte 9(4), Jórun S. Ludvík 2, Linda Weihe 1, Anja Heinadóttir 1, Ronja M. Mikkelsen 1, Hildur Høghamar 1, Randi S. Wardum 1
**Brotskøst:** Neistin 6, Kyndil 5
**Útvísingar:** Neistin 1, Kyndil 3
**Dómarar:** Hallur Danielsen & Dánjal Samuelsen. Í einum til tíðir rótutum dysti vóru teir ikki altíð heilt vaknir.